## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og um morgunin regn, men annars turt og sólglottar. Hitn millum 15 og 18 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, um kvøldið lot av ymsum ættum. Stundum regn ella mjørki og hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 16 og 20 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR:

# - Eg veit ikki um eg dugi at ferðast

**Heidi Andreasen er javnan uttanlands til svimjikappingar, men tá fylgir hon einari neyvari skrá. Nú skal hon fyri fyrstu ferð í langa tíð uttanlands við vinkonunum, men hon ivaðist í, um hon fer at duga at ferðast púra frítt**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Hvussu er at fara uttanlands til svimjikappingar?**
- Tá ið eg fari til kappingarnar uttanlands, fylgi eg einum planløgdum programmi, og tá eru ikki stundir til nógv annað enn kappingina. Eg upplivi altíð nógv fyri tað, men tað er ikki tað sama, sum at fara at ferðast og hava frí.

**Plagar tú at fara uttanlands í feriu?**
- Nei, tað er sera langt síðani, at eg var uttanlands og hevði frí, men nú verður tað. Síðst í juli fara eg og nakrar vinkonur til Kroatia at ferðast. Eg havi altíð sagt, at eg vildi onkrastaðni suðureftir, tá ið eg var liðugt við student, og tað er rættiliga spontant, at vit hava valt Kroatia. Eg veit bara ikki, um eg dugi at ferðast nú. Eg eri so von við, at alt er fastlagt, tá ið eg eri uttanlands, men nú verður alt frítt. Tað verður bara spennandi at sleppa at royna tað.

**Upplivir tú nakað annað enn ítrótt, tá tú ert til svimjikappingar uttanlands?**
- Tá ið eg eri til kappingar, so er tíðin ofta so avmarkað, at eg eri bara í svimjihøllini, so eg kenni nógvar svimjihølli kring um í Europa. Tað er eitt sindur øðrvísi, tá ið eg eri á venjingarlegu, tí tá plaga vit at seta ein hálvan dag av til at royna okkurt, fara í býin ella hyggja okkum um.

**Tú hevur júst verið í Sheffield í Onglandi og kappast. Hvussu var tann býurin at vitja?**
- Eg havi verið fleiri ferðir áður í Sheffield og kappast, so eg kenni meg aftur har. Men at verða í Onglandi er altíð í eitt sindur serligt, tí onglendingar hava sítt egna. Morgunmaturin, og so vendir alt eitt sindur øvugt. Aftur hesaferð bleiv eg við at fara inn í skeivari síðu í bussinum.

**Seinni í ár fert tú til Suðurafrika at kappast. Hvat væntar tú tær av teirri ferðini?**
- Tað er fyrstu ferð, at eg sleppi til eitt afrikanskt land, so eg eri sera spent til ferðina. Eg havi verið í Australia og Brasil, men eg mangli at sleppa til Afrika. Eg gleði meg sera nógv til hesa ferðina, og vónandi fer tað eisini at ganga væl í HM-kappingini.



*- Tá ið eg eri til kappingar, so er tíðin ofta so avmarkað, at eg eri bara í svimjihøllini, so eg kenni nógvar svimjihølli kring um í Europa, sigur Heidi Andreasen, sum um vikuskiftð vann seks gullmerki í altjóða kapping í Sheffield.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 24 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 30 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 32 |
| Kiev | 29 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 29 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 13 |
| New York | 28 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1036 hPa. yvir Bretsku Oyggjunum fer spakuliga eystureftir. Eitt lágtrýst, 981 hPa. við Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarmorgunin.




**Í dag:**
Lágtrýstið norðan fyri Ísland fer norðureftir og kuldabrúgvin eystan fyri Føroyar fer eystureftir. Eitt lágtryst yvir Atlantshavinum fer í landnyrðing og verður væntandi við Føroyar sunnukvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/7 kl. $06^{00}$– 13/7. $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2 mm – mált frá 12/7 kl. $06^{00}$– 13/7 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 33,6 mm

Brúðarlín
v/Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

www.sosialurin.fo

GEVIÐ BLÓÐ

## VESTFALLSKYRRINDI

17. juli Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. Juli | 10.07 | 22.30 | 09.07 | 21.30 | 09.22 | 21.45 | - | 12.07 | 00.42 | 13.07 |
| 15. Juli | 10.54 | 23.16 | 09.54 | 22.16 | 10.09 | 22.31 | 00.30 | 12.54 | 01.30 | 13.54 |
| 16. Juli | 11.39 | - | 10.39 | 23.31 | 10.54 | 23.46 | 01.16 | 13.39 | 02.16 | 14.39 |
| 17. Juli | 00.31 | 12.52 | 11.52 | - | - | 12.07 | 02.31 | 14.52 | 03.31 | 15.52 |
| 18. Juli | 01.46 | 14.06 | 00.46 | 13.06 | 01.01 | 13.21 | 03.46 | 16.06 | 04.46 | 17.06 |

| Dagur | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. Juli | 08.22 | 20.45 | 07.22 | 19.45 | 10.22 | 22.45 | 11.22 | 23.45 | 09.52 | 22.15 | 11.07 | 23.30 |
| 15. Juli | 09.09 | 21.31 | 08.09 | 20.31 | 11.09 | 23.31 | - | 12.09 | 10.39 | 23.01 | 11.54 | - |
| 16. Juli | 09.54 | 22.46 | 08.54 | 21.46 | 11.54 | - | 00.31 | 12.54 | 11.24 | - | 00.16 | 12.39 |
| 17. Juli | 11.07 | - | 10.07 | 23.01 | 00.46 | 13.07 | 01.46 | 14.07 | 00.16 | 12.37 | 01.31 | 13.52 |
| 18. Juli | 00.01 | 12.21 | 11.21 | 23.45 | 02.01 | 14.21 | 03.01 | 15.21 | 01.31 | 13.51 | 02.46 | 15.06 |

5 707265 100067 >